# – Nú mugu vit berjast víðari

*Jóannes Eidesgaard staðfestir, at flokkur hansara sambært veljarakanningini hevur fingið sera stóra framgongd. Hann heldur, at orsøkin er hart arbeiði, og hetta arbeiði skal halda á. – Vit mugu ikki leggja okkum upp afturá, men vit mugu halda á at stríðast fyri okkara málum, sigur hann*

Sveinur Tróndarson

Tann flokkurin, sum burturav hevði fingið størstu undirtøkuna var val í dag, er Javnaðarflokkurin. Eina framgongd upp á 5,4 prosent og tveir tingmenn afturat teimum sjey, sum sita í dag, hevði verið úrslitið. Og formaðurin í flokkinum er bæði fegin og errin um úrslitið av kanningini.

– Kanningin, sum kortini bara er ein kanning, er ein greið ábending um, at tað, sum vit gera er á góðari leið. So góðari, at vit fáa nógv fleiri veljarar afturat, sigur hann.

Men hann veit eisini, at tað skjótt kann ganga hinvegin og tí skal arbeiðast víðari á somu kós.

– Flokkurin hevur eina sera góða og aktiva tingmanning, sum eigur meginpartin av heiðrinum fyri frmgongdina og vit eru øll greið yvir, at vit skulu stríðast fyri at halda fast, um tað framgongd, sum tað sær út til at vit hava havt.

### Ríkisrættarliga støðan høvuðsorsøkin

Formaðurin í Javnaðarflokkinum er samdur við formonnunum í hinum flokkunum um, at tað serliga er tann ríkisrættarliga støðan, sum er orsøkin til framgongdina hjá Javnaðarflokkinum.

– Tað er tað málið, sum mest tíð verður brúkt uppá, og tí er tað eisini tað málið, sum uttan iva ávirkar mest í hesi veljarakanningini. Men kortini eru onnur mál, sum eisini hava fest seg í hugan hjá fólki, sigur hann og nevnir dømi sum búskapin og landssjúkrahúsið

*Tit hava verið rættuliga aktivir í andstøðuni í seinastuni, men er tað ikki rættiliga óbindandi, at seta uppskot fram, sum kortini ikki fáa undirtøku, men kortini fáa ágóðan av tí millum veljararnar?*

– Tað er avgjørt ikki óbindandi, tí málini eru trúgv móti floksskránni. Tað síggja veljararnir og teir vita hvar teir hava okkum. Tað er farin fram ein greið høgrasnaring í føroyskum politikki og har eru vit tann greiða mótvektin, sum framhaldandi togar til vinstru. Men tað er rætt, at tá vit sita í andstøðu, so eru vit ikki so bundin, sum tá vit sita í samgongu. Har skal finnast eitt felags stev við aðrar flokkar og tí dettur tann flokspolitiski parturin burtur í samgongu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann leggur afturat, at tað er sunt fyri ein flokk, at koma í andstøðu, tí har kann hann aftur vísa sítt egna andlit.

– Allir flokkar eiga at sleppa í andstøðu av og á, fyri at koma fyri seg, so at siga.

### Ikki undirtøku í fólkinum

Sum kunnugt er samgongan í Danmark og samráðist við donsku stjórnina, men Jóannes heldur ikki, at henda veljarakanningin kemur serliga væl við hjá teimum.

– Áðrenn teir fóru vistu



– Veljarakanningin er ein góð ábending um at politikkur okkara er á góðari leið, men vit kunnu ikki leggja okkum upp afturá. Vit mugu stríðast fyri okkara málum, sigur Jóannes Eidesgaard

teir, at teir høvdu ikki ta breiðu undirtøkuna í tinginum, og nú vita teir, at teir heldur ikki hava eina breiða undirtøku í fólkinum, so í veruleikanum standa teir illa í tí, nú teir skulu fara at samráðast.

*Men kortini hava tit latið teir farið til Danmarkar at samráðast um broytingar í ríkisrættarligu støðuni?*

– Júmen, tað hava teir sín fulla rætt til. Tað er eingin ivi um, at landsstýrið hevur tann parlamentariska rættin at samráðast og tí skulu vit heldur ikki forða teimum í tí, men støðan teir eru í, er ikki tann besta, tá tað ikki er greiður meiriluti fyri fullveldisupskotinum.

Jóannes vísir eisini á, at útmeldingarnar frá formonnunum í donsku andstøðuflokkunum geva boð um, at samgongan er illa skødd nú hon er farin út á ísin at standa.

– Í donskum politikki er tað so, at tá talan er um uttanríkismál, so er eitt sera gott samstarv millum stjórn og andstøðu, og tí haldi eg tað vera sera áhugavert, at báðir teir stóru andstøðuflokkarnir geva so greið boð um, at føroyingar ikki skulu vænta sær eina langa skiftistíð.

*Men kann andstøðan í Danmark ikki siga so nógv, tá hon kortini ikki situr við samráðingarborðið?*

– Nei, soleiðis virkar tann danska skipanin ikki. Teirra samstarv á hasum økinum er sera væl skipað og tí verður tað avgjørt nakað, sum stjórnin hevur í huganum, sigur Jóannes.

Hann leggur afturat, at føroyska støðan gott kann enda við at gerast partur av donskum innanríkispolitikki, kanska serliga við tí búskaparliga partinum í huga.

### Stóra virðing fyri teimum

Veljarakanningin vísir eisini at 40 prosent av teimum, sum spurdu siga, at tey vilja taka eina niðurgongd í livistøðinum afturfyri at fáa fullveldið. Hetta er lutfalsliga høgt tal og tað viðgongur Jóannes eisini.

– Men hasum havi eg sera stóra virðing fyri. Teimum fólkunum, sum vilja gjalda fyri at Føroyar gerast fullveldi taki eg hattin av fyri, tí tað vísir, at tey ganga inn fyri tí tey trúgva upp á. Soleiðis má tað eisini vera. Tað nyttar einki, at siga, at vit vilja hava fullveldið, men vit vilja ikki gjalda, sigur Jóannes, sum kortini vísir á, at tað er meiri enn helmingurin, sum ikki vil, at livistøðið, skal lækkað.

Hann heldur, at tey, sum hava hesa støðu eru kjarnuveljararnir hjá Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum, sum ganga inn fyri fullveldinum, men hann heldur eisini, at tann veruleiki, at fólkaatkvøðan enn er so langt frá, at fólk ikki hugsar nóg nógv um avleiðingarnar av eini fólkaatkvøðu, ger sítt til, at so nógv vilja taka avleiðingarnar av fullveldinum.

### Gott at fáa eina ábending

Niðurstøðan hjá Jóannesi er tí, at tað var framúr gott at fáa eina ábending um, hvar flokkurin stendur millum veljararnar.

– Tað hevur ikki verið siður í føroyskum politikki at gera veljarakanningar og eftir míni meting áttu tað at verið gjørdar nógv fleiri. Tær geva okkum politikarum ábendingar um vit eru á rættari leið, ella um vit eru farnir heilt av sporinm. Nú hava vit fingið eina ábending, og hon er framúr góð. Men vit mugu fyri Guds skyld ikki leggja okkum upp afturá og njóta okkara góða avrik. Nú skulu vit bróta upp ermar og berjast víðari, sigur Jóannes.

Hann leggur afturat, at úrslitið av kanningini skal brúkast konstruktivt. Tað vísir, at politikkurin, sum flokkurin hevur rikið, er á rættari leið, og at hann tí skal halda fram á somu kós.



# – Fólk eru bangin fyri avleiðingunum

*Edmund Joensen, formaður í Sambandsflokkinum, er sjálvsagt sera fegin um, at hansara flokkur sambært veljarakanningini hevur havt eina stóra framgongd, og hann gevur fullveldismálinum æruna meginpartin av æruni fyri tað. – Fólk eru bangin fyri búskaparligu avleiðingunum og tí leita tey aftur til Sambandsflokkin, sigur hann*

Sveinur Tróndarson

Orsøkina til framgongdina hjá Sambandsflokkinum

*– Eg eri sjálvandi fegin um, at Sambandsflokkurin fær so góða undirtøku millum veljararnar, men eg loyvi mær at ivast stórliga í, um tað er rætt, tá sagt verður, at størsti meiriluti fyri fullveldinum er at finna í Eysturoynni, sigur Edmund Joensen*

sigur Edmund Joensen vera, at veljararnir eru óttafullir.

– Samgongan arbeiðir við eini ætlan, sum fer at ávirka føroyska búskapin og tað er ikki nakað, sum hóvar føroyinginum. Honum dámar ikki, at okkara búskapur verður kroystur óneyðuga nógv av ríkisrættarligum broytingum, og tí koma teir spakuliga aftur til Sambandsflokkin, sigur Edmund Joensen.

*Men kortini vísir veljarakanningin, at tað eru fleiri fyri fullveldinum og hon vísir eisini, at fýra út av hvørjum tíggju eisini vilja taka búskaparligu avleiðingarnar av fullveldinum. Hvat sigur tú til tað?*

– Tað sigur mær bara, at tey, sum atkvøða fyri fullveldinum vilja bera kostnaðin av tí, sigur Edmund.

Annars heldur Edmund eina aðra orsøk til framgongdina hjá Sambandsflokkinum vera, at teir – saman við Javnaðarflokkinum – hava givið samgonguni ábendingar um, at tað ber til at finna eina semju í andstøðuni.

– Vit hava sent tekin um, at vit vilja arbeiða fyri eini loysn, sum ikki er so víðgongd, sum tann hjá samgonguni, og tað er uttan iva nakað, sum eisini fær veljaran til at geva Sambandsflokkinum sína atkvøðu, sigur Edmund Joensen.

### Andstøðupolitikkurin hjálpir til

*Tað er eingin loyna, at Sambandsflokkurin seinasta hálva árið hevur verið rættuliga aktivur í andstøðuni. Kanska ikki júst á fullveldisøkinum í sama mun, sum hinir flokkarnir, men meira á øðrum økjum. Ymisk uppskot um størri veitingar til pensjónistar hava verið á lofti, og hóast flestu teirra eru fallin, so hava uppskotini verið frammi. Heldur Edmund, at hetta hevur givið størri undirtøku millum veljararnar?*

– Tað er møguligt, men tað er ikki høvuðsorsøkin. Eg ivist onga løtu í, at fullveldismálið er tað, sum upptekur fólk flest og tí er tað eisini tað, sum hendir á tí økinum, sum hevur størstu ávirkanina, sigur Edmund Joensen.

Kortini er hann ikki bangin fyri at viðganga, at ein aktivur andstøðupolitikkur eisini hevur sína ávirkan. Eisini sjálvt um uppskotini ikki vinna frama.

Sjálv støðan í fullveldismálinum har umleið líka nógv eru fyri og í móti, heldur Edmund ikki vera so løgna.

– Soleiðis er tað ofta í so stórum málum. Tá fara veljararnir í tveir líka stórar bólkar og so verður arbeitt út frá tí, tá samráðingarúrslitið fyriliggur.

– Hvussu tað endaliga úrslitið fer at síggja út, við býtinum fyri og ímóti, er sjálvandi knýtt at samráðingartíðini, úrslitinum og tí kunningarvirksemi, sum verður gjørt áðrenn og aftaná, at samráðringarnar eru lidnar, og har hava m. a. fjølmiðlarnir eisini eina ábyrgd, sigur Edmund

### Vónbrotin av tølunum úr Eysturoynni

Tað, sum kortini hevur tikið Edmund Joensen eitt sindur av bóli er, at hansara valdømi, sambært veljarakanningini, hevur ta størstu undirtøkuna fyri fullveldismálinum.

– Hasum trúgvi eg heilt einfalt ikki, sigur Edmund púra avgjørdur.

– Eg kenni Eysturoynna og veit, at tað eru ikki farnar so stórar flytingar fram í oynni. Tað eri eg fullvísur í, so tað má vera ein veikleiki við hesari veljarakanningini, sigur Edmund Joensen.

Hann leggur afturat, at býti í Suðurstreymoy eisini gongur øvugt, at tí, sum vanliga verður hildið at vera vanligt, men smílandi leggur hann afturat, at tað kann vera tí, at fólk í Suðurstreymoy eru komin á »rætta leið«.

– Men so er tað soleiðis, at tað er skeivt roknað fyri Eysturoynna, men rætt fyri Suðurstreym, leggur hann flennandi afturat.

Og tað kann vera nakað um tað, sum Edmund sigur, tí hóast Sambandsflokkurin hevur sera gott tak á eysturoyingum og m. a. eigur tveir tingmenn í oynni, so siga 60 prosent, sambært veljarakanningini, at tey taka undir við fullveldisuppskotinum hjá samgonguni.

### Aldursbýtið torført at tosa um

Ein niðurstøða, sum kann gerast burturúr veljarakanningini er, at tað eru tey yngru og so tey heilt gomlu, sum serliga taka undir við samgonuætlanini.

*Í aldursbólkunum frá 18 til 54 ár og tey, sum eru eldri enn 78 ár, eru fleiri, sum siga seg taka undir við fullveldisætlan landsstýrisins, meðan bólkarnir frá 54 til 78 hava meiriluta ímóti, hvør er frágreiðingin til tað?*

– Hatta er trupult at siga nakað um. Kanska er niðurstøðan, at tað serliga eru tey tilkomnu, sum velja Sambandsflokkin, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur gott tak á teimum yngstu veljarunum. Tað er ikki óhugsandi at tað er so, og eg haldi at góða úrslitið hjá Tjóðveldisflokkinum við seinasta val eisini gav ábendingar um tað.

– Vit mugu nokk staðfesta, at tað er hend ein polarisering í Føroyum á hasum økinum, har tey ungu velja Tjóðvaldisflokkin serliga, sigur Edmund, sum kortini leggur dent á, at hann er stak væl nøgdur við forsøgnirnar fyri hansara flokk.

– Tað vísir, at vit eru á rættari leið, og tí fara vit at halda á í sama spori, sigur Edmund at enda.





– Eg eri eitt sindur bilsin av, at kanningin ikki fer verri við Tjóðveldisflokkinum, sigur ein fegin Heini O. Heinesen

# – Eg eri fegin og bilsin

*Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum er væl nøgdu við veljarakanningina hjá, sum varð almannakunngjørd í fyrradaagin. – Bæði flokkurin og fullveldismálið hava viðrák og tað eri eg stak fegin um, sigur hann*

Sveinur Tróndarson

– Hóast Tjóðveldisflokkurin fekk eitt sera gott val seinast og hóast vit í samgonguni umsita málsøki, sum eru sera viðkvom, so klára vit at halda fast við tann veljaraskara, sum vit høvdu til seinasta val og enntá leggja nakrar afturat og tað eri eg sera væl nøgdur við, sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Heini O. Heinesen í eini viðmerking til seinastu veljarakanningina.

Hann vísir á, at flokkurin eigur fíggjarmálaráðharran og hansara arbeiðsøkið hevur verið partur av nógvum arbeiðsósemjum seinasta árið, men kortini tykist tað ikki hava ávirkað støðu veljarans.

– Tað kann í grundini vera nokkso løgið, tí ofta plagar slíkt at síggjast aftur í veljarakanningum, men vit eru sloppin væl frá tí, sigur Heini O. Heinesen.

### Fullveldismálið hjálpir til

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum dylir heldur ikki fyri, at hann heldur seg kenna orsøkina til, at støðan hjá flokkinum er sum hon er.

– Tað er ikki óhugsandi, at okkara heilt greiða støða í fullveldismálinum er ein beinleiðis orsøk til, at vit varðveita veljararnar, sum vit høvdu til seinasta val, sigur Heini O. Heinesen.

Tann parturin av veljarakanningini sigur, at tað stendur so at siga á jøvnum millum tey, sum siga ja og tey, sum siga nei. Kortini við einum lítlum meiriluta til teirra, sum vilja fullveldið.

– Eg haldi, at Føroya fólk greitt hevur sagt, at tey vilja hava greiðar broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum við Danmark og henda veljarakanningin vísir eisini, at so er.

*Veljarakanningin sigur eisini, at meiri enn helmingurin av veljarunum trýr uppá, at vit kunnu finna eina aðra loysn innanfyri ríkisfelagsskapin. Hvat sigur tað tær?*

– Ikki so nógv, burtursæð frá, at veljarin hevur eina meting um tað. Har er einki ítøkiligt komið fram um, hvat fyri aðra skipan vit skulu finna innanfyri ríkisfelagsskapin. Tí leggi eg størri dent á tann partin av veljarakanningini, sum sigur, at tað eru fleiri, sum siga ja, enn tað eru sum siga nei, sigur Heini O. Heinesen.

### Munurin er so lítil

Um politisku støðuna í Føroyum sigur Heini, at hann heldur støðuna, sum andstøðan hevur sett seg í, verða óhepna. Her hugsar hann serliga um støðuna hjá Javnaðarflokkinum, tí henda veljarakanningin vísir, at ein fittur partur av javnaðarveljarunum hava givið ábendingar um, at teir vilja taka undir við fullveldinum.

– Í sendingini Krosskast greiddi Anfinn Kallsberg rættiliga væl frá hvussu lítil munurin er millum samgonguna og serliga Javnaðarflokkin, og tí haldi eg, at fráboðanin hjá Javnaðarflokkinum um, at teir eru ímóti fullveldinum, kemur ov tíðliga, sigur Heini.

*Hvat liggur aftanfyri ta metingina?*

– Sum eg sigi, so er munurin millum teir og samgonguna, eftir okkara meting, rættuliga lítil, og eitt gott samráðingarúrslit kann gera, at Javnaðarflokkurin kann taka undir við tí, sum landsstýrið kemur aftur við.

*Men vit kunnu ikki siga. at tað, sum danskir andstøðupolitikarar siga, ber ikki á tað borðið?*

– Eg hefti meg ikki so nógv við, hvat danskir andstøðupolitikkarar siga, men heldur hvat samráðingarúrslit okkara menn kunnu koma fram til. Kortini er tað merkisvert, at Vinstri og teir konservativu nú siga, at teir viljva varðveita okkum í ríkisfelagsskapi við teir – á jøvnum føti – tað ber eftir okkara meting ikki til, og tí haldi eg, at hatta bara er enn eitt tekin um, at teir bara vilja eiga Føroyar, sigur Heini O. Heinesen.

Hann leggur afturat, at tað danskir andstøðupolitikkarar úttala seg eftir eisini vísir, at teir ikki hava fatað, hvat tað snýr seg um, tí føroyingar vilja sjálvir ráða – og gjalda – í egnum landi, sigur Heini O. Heinesen.

### Rúsdrekkamálið onga ávirkan

*Fyri stuttari tíð síðani var frammi í fjølmiðlunum, at partar av Tjóðveldisflokkinum hava havt trupulleikar við rúsdrekka í sambandi við teirra arbeiði í tinginum. Hóast tað kundi væntast, at hetta fór at síggjast aftur í veljarakanningini, so er ilt at fáa eygað á tað í hvussu er. Hvat heldur Heini orsøkina vera til tað?*

– Eg haldi ikki, at fólk ganga runt í landinum og trúgva, at okkara menn altíð ganga ávirkaðir í tinginum og fyri tann skuld, at tingmenn í heila tikið ganga fullir og mæla, sum okkurt blað royndi at vísa á. Tað haldi eg var órættvíst móti tinginum, sigur Heini.

– Sjálvandi skal eingin reypa sær av, at hava trupulleikar við rúsdrekka og tað gera vit heldur ikki, men vit hava valt, at tosa opið um at trupulleikin er til, og tað er kanska orsøkin til, at tað ikki sæst aftur í veljarakanningini. Men tað er einki at dylja yvir, at tað framhaldandi er líka óheppið, sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum.

Niðurstøða hansara er tí, at veljararar floksins hava víst, at teir ganga meira upp í politikkin. Fullveldismálið er sett ovast á breddan og tað er tað, sum fólk hugsa um, í fyrsta umfari í hvussu er, heldur hann.

– Og tá vit taka samanum, haldi eg, at tað er tað týdningarmiklasta og har hava vit nógv at gleðast um, sigur Heini O. Heinesen.


Mest selda maskina 6. árið á rað

Mest seldi mini-gravari í Føroyum nakrantíð




Við eini HANIX maskinu kann tú altíð kenna teg tryggan.
Vit hava royndirnar, vitanina og tænastuna.
Tað sigur ikki einki, at yvir 85% av øllum mini-gravarum í Føroyum eita HANIX.

O. K. HEILSØLA & MASKINUR

430 Hvalvík - Tlf. 422394